Nr. 231 - 29. november 2001 Sosialurin 13

# Føroyskar fyritøkur skuffaðar av oljuvinnuni



*Mynd: Jan Mortensen, stjóri fyri Vinnuhúsið, legði á oljuráðstevnuni fram úrslitið av einari frágreiðing, sum Vinnuhúsið hevur staðið fyri. Hini á myndini eru Malan Johansen og Magni Arge*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Bert 12% av føroysku fyritøkunum hava fingið fulla úrtøku burturúr oljuvinnuni í Føroyum. Vinnuhúsið hevur gjørt eina kanning, sum kannar eftir, hvat føroyskar fyritøkur hava fingið burturúr oljvuvinnuni. Enn eru trøini ikki heilt voksin inn í himmalin**

OLJURÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*

Tann fyrsti av teimum seks, sum skuldu siga eitt sindur um luttøkuna hjá føroyskum vinnulívið í oljuvinnuni, var Jan Mortensen, stjóri fyri Vinnuhúsið hjá Føroya arbeiðsgevarafelag.

Hann bygdi sína framløgu á eina kanning, sum Vinnuhúsið hevur gjørt. Kanningin byggir á spurningar í sambandi við luttøkuna hjá føroyskum virkjum í oljuvinnuni í Føroyum.

Spurnarbløð vórðu send út til 72 fyritøkur. 45 av hesum somu fyritøkum ella 63% svaraðu spurnarblaðnum frá Vinnuhúsinum. Hetta sigur so mikið sum, at tey, ið svaraðu, kanska ikki geva eina fullfíggjaðu mynd, men eru ein hampulig umboðan.

## Leys svør

Av teimum 45 fyritøkunum hava 30 latið oljuvinnuni útbúnað ella vøru. Tann størsti parturin av fyritøkunum hava latið heilsøluvøru og tænastur. Tann størsti parturin av hesum veitingum fara til stóru veitarinar hjá oljufeløgunum og eitt sindur minni fer til oljufeløgini sjálvi. Til spurningin um, hvussu tað gekk við at fara í holt við oljuvinnuna. 40% av halda, at tað gekk væl. Hinvegin siga 17%, at tað gekk ikki væl. Tann størsti parturin, 43%, siga, at tað gekk soleiðis nøkulunda. Tað er torført at siga júst hvat, ið hetta sigur. Spurningurin er rímiliga leysur, og spurningartekin kunnu setast við, hvat størsti parturin, sum hevur svarað rímiliga væl meinar við hesum. Tað er sjálvsagt bert tey, ið hava tikið lut í oljuvinnuni, sum hava svarað hesum spurninginum.

Kanningin spyr eisini, hvørjum fyritøkurnar hava havt trupulleikar av. Størstu trupulleikararnir hjá fyritøkunum hava verið við útlendskari kapping og samskifti. Tað økið, sum føroyskar fyritøkur hava staðið seg best sambært kanningini, er innanfyri competence ella førleika. Allar fyritøkurnar vórðu spurdar henda spurning.

Góðska og Heilsa og umhvørvi hava givið fyritøkunum eitt sindur av trupulleikum. Størsti parturin av trupulleikunum koma undir bólkin eitt sindur av trupulleikum ella nógvir trupulleikar.

## Ivasamt

Ein lítil triðingur av teimum føroysku fyritøkunu, sum hava verið við at veita til oljuvinnu, hava latið fyri yvir eina millóin krónur. 37 % av fyritøkunum hava latið vørur, tænastur og annað fyri undir hundraðtúsund krónur, og 23% hava latið fyri millum hundraðtúsund og fimmhundraðtúsund krónur. Á ráðstevnuni varð tað eisini ført fram av einum oljufelag, at umsetningurin ímillum føroyskar fyritøkurnar hevði verið ógvuliga stórur, men hetta er eftir øllum at døma smábýtt.

Omanfyrinevnda svar ger tað kanska eisini lættari at skilja tann næsti spurningin í røðini. Spurninguri ljóðar, um fyritøkurnar hava fingið tað, ið tær høvdu væntað burturúr oljuvinnuni. Tær 45 fyritøkurnar geva eina ikki stórvegis positiva mynd. 12% havi fingið tað burturúr, ið tær høvdu væntað sær, áðrenn oljuvinnan kom til landið. 24% siga harafturímóti beinleiðis nei til spurningin, um hetta nýggja ævintýrið gav teimum tað, ið tey høvdu miðja ímóti. Tann stóri parturin, 64%, verða samlaði undir tí allýsandi svarinum: To some extent ella eitt sindur.

## Bryggjukanturin

11 av teimum 45 fyritøkum siga beinleiðis eisini, at lóggávum um, at alt skal um føroyskan bryggjukant hevur als ongan týdning havt. 22 fyritøkurnar meta hetta lógarverk hava havt sera stóran týdning, og hinar 12 liggja einastaðni mitt ímillum. Fyritøkurnar hava heldur einki gott at bera lóggávuni, tá ið tað verður spurt, um hetta hevur økt um teirra førleika og møguleikan. Ein meirilutir av fyritøkunum, ið tóku lut kanningini, siga, at lógin hvørki hevur betra um teirra møguleikar heldur ikki teirra egna førleika. Hinvegin vilja so at siga allar fyritøkurnar varðveita lógarregluna um bryggjukantin.

Tað stutta av tí langa má vera, at trøini kanska ikki heilt náddu vegin fram niðan í himmalin í hesum umfarinum. Hvussu framtíðin háttar verður sjálvandi spennandi at vita.




*Í tí jarðfrøðiliga økinum, ið Føroyar eru partur av, væntar Richard F.P. Hardman ikki at finna eins nógva í olju og í Víkinga grøvini høgrumegin*

Richard Hardman, oljuserfrøðingur:

# Týdningarmikið at vera við frá byrjan

**Ein av fremstu serfrøðingunum hjá Amerada Hess, Richard Hardman, tosaði á oljuráðstevnuni m.a. um, hvussu teir hava valt at satsa upp á Føroyar. Hann segði seg vera ógvuliga fegin um úrslitið higartil**

OLJURÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*

Richard F. P. Hardman er rættiliga kendur í Føroyum. Hann hevur í longri tikið aktivt lut í oljuleiting og oljuvirksemi undir Føroyum eins og hinumegin markið. Hann hevur umboðað Amerada Hess í Føroyum, har hann starvast sum ráðgevi. Hann hevur 40 ára royndir innanfyri oljuvinnu, og hann situr eisin í fleiri nevndum í Bretlandi. Á oljuráðstevnuni var hann ein av teimum sokallaðu Key-note Speakers, sum fingu eitt sindur meira av tíð til at tosa enn hinir røðararnir.

Røðan hjá Richard Hardman bar heitið Handling Exploration Risk. Sum navnið eisin sigur, so snúði ein stórur partur av hansara røðu seg um, hvussu eitt oljufelag metur um vágar og hvussu feløgini so avgera, um leitingin skal fara fram ella teir skulu broyta ætlan.

## Vági

Richard Hardman greiddi í sínari røðu frá, at tað vóru tveir høvðuslutir, sum mann leggur dent á í einari oljuleiting. Tað er kostnaðurin og óvissan. Við at gera kanningar og royndarboringar, so minkar tað sjálvandi eitt sindur um óvissuna, men hækkar samstundis um kostnaðin. Hann greiddi frá, at Føroyar enn vóru eitt rættiliga óvist øki. Í løtuni verða fleiri og fleiri boringar gjørdar, soleiðis at óvissan spakuliga minkar, men hinvegin hækkar kostnaðurin jú almikið.

Amerada Hess ella samtakið hjá teimum hevur sett góðar 140 mió av til hesar royndarboringarnar, og samanumtikið hevur Amerada Hess sett 35 mió. dollarar ella góðar 435 mió krónur. Og, sum Richard so klárt segði, hetta merkir ikki at vita at olja er har, tí so var ikki neyðugt hjá okkum at bora.

Amerada Hess nýtir árliga milliardir av krónum til leiting eftir olju og royndarboringar. Tað er sjálvandi ógvuliga ymiskt, hvussu úrslitið verður, men tað er ógvuliga vanligt, at brunnar eru tómir fyri olju. Eisini kemur tað fyri, at hendan oljan ikki kann fáast upp, eitt nú orsakað av goymslugrýtinum.

Hjá einum oljufelag sum Amerada kann kostnaður, tá ið tað er klárt til at fara undir boring hava samlað til upp ímóti einari milliard dollarar, vísti Richard Hardman á. Tað kann eisini taka upp ímóti 10 árum ella meira frá tí byrja verður við kanningum til til ein gevandi framleiðslufasa kann fara ígongd.

## Ikki so nógv olja

Í teirri sera áhugaverdu røðuni hjá Richard Hardman, greiddi hann eisini eitt sindur frá, hvussu tað jarðfrøðiliga hekk saman við Føroyar og hjá Hetlandi. Brunnirnar við Hetlandi vóru eisini teir, sum fingu oljufeløgini at leita við okkar leiðir.

Hann greidd frá, at teir eftir tær seismiskukanningarnar vóru rættilig væl nøgdir og spentir. Tær vístu, at her væl sagtans kundi vera olja. Ætlaðu boringarnar góvu ikki heilt tað úrslitið, sum teir høvdu væntað, tá ið teir fyri tað nógva raktu seg í sand. Sum øllum kunnugt so boraðu teir longur niður enn ætlað, og har var olja funnin. Tann oljan, sum teir funnu, kunnu teir ikki siga so nógv um sum nú er. Tað er oljan til í reservoirinum, men enn hevur tað ikki eydnast teimum at gera sær eina mynd av goymslugrýtinum í brunninum. Fleiri royndir vilja siga teimum meira um hetta.

Richard Hardman samanbar hetta øki við North Viking Graben, sum hann kallaði tað, har teir hava funnið ovurhondsstórar nøgdir av olju. Richard Hardman metir ikki, at jarðfrøðiligu viðurskiftini eru tey røttu til, at ikki meira enn ein góður 1/5 av tí olju, sum er í Víkinga grøvini, er at finna í føroysku undirgrundini.

*Richard F. P. Hardman er víðagiting kring allan heim í sambandi við oljuvinnuni. Á Offshore Faroes segði hann eitt sindur um, hvat vit føroyingar kunnu vænta okkum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




